# O. K. Heilsøla

Óli Karl Hansen byrjaði í 1991 við fyritøku sínari, O. K. Heilsølu. Tá hevði hann alt virksemið heima við hús, men í ár 2000 byrjaði hann í bygninginum á havnarlagnum í Hvalvík, har hann húsast enn. Hann hevur fyri tað mesta arbeitt einsamallur, men nú fær hann tó eisini hjálp frá konuni og dóttrini.

O. K. Heilsøla selur gravimaskinur, rennigravarar, stórar lastbilar og tílíkt, og Óli Kári hevur úr at gera.

- Tað er ikki nøkur ávís tíð á árinum, har eg havi mest at gera. Eg havi úr at gera at kalla alt árið, og til tíðir er nokk eisini ov nógv, men mær dámar hetta væl, sigur Óli Karl.

Óli Karl selur annars rættiliga nógv til bæði landbúnaðin og entreprenørar, og m.a. seldi hann eina rúgva av traktorum til landbúnaðin í fjør. Hann sigur seg eisini hava eitt stórt úrval av tí, hann selur.

- Eg havi nokk størst úrval av slíkum í landinum. Eg vænti, at eg eigi um 70 % av hesum marknaði í Føroyum.

O. K. Heilsøla hevur eisini eykalutir til mest sum alt. Hann hevur líka frá byrjan av havt eitt gott samstarv við Bay Christensen A/S í Danmark, og eru eykalutirnir ikki á goymslu í Føroyum, so kann Óli Karl lætt skaffa niðri frá.




*O. K. Heilsølu í Hvalvík selur gravimaskinur, rennigravarar, stórar lastbilar og tílíkt, og Óli Karl Hansen heldur seg eiga á leið 70 % av hesum marknaði í Føroyum*













